## SKÚLALEIÐARIN

Skúlaleiðarar verða bidnir um at svara spurnarblaði um skúlaviðurskifti, undirvísingarviðurskifti og næmingar skúlans. Hetta eru spurningar um undirvísingartilfar og -vav, fakligu menning lærara og foreldrasamstarv.

## PISAFRÁGREIÐING 2016:

https://d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net/media/8769/pisa-2015-frágreiðing.pdf




## HVØR SKIPAR FYRI PISA

MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF EDUCATION, RESEARCH AND CULTURE

Próv STOVAN

DANMARKS STATISTIK

LES MEIRA Á

www.provstovan.fo
&
WWW.PISA2018.DK
&
www.UVM.dk

# PISA

Til heim, næming og skúla



Eg skal til PISA:

HVAT,
HVUSSU
HVÍ

PISA 2018

LES SVARINI HER >>

## HVAT ER PISA?

- OECD stendur fyri **PISA-kanningum**, sum hava verið triðjahvørt ár síðan í 2000. PISA er altjóða kanning av, hvussu tað liggur fyri hjá ungum í ymsum londum at brúka ta vitan, sum tey hava fingið í skúlanum.
- Spurningarnir í PISA-kanningini eru sum so ikki pensum. Spurningarnir eru gerandisligar uppgávur í lesing, støddfrøði og náttúrulæru.
- Úrslitið av PISA-kanningini kann brúkast til at síggja, hvar **føroyskir næmingar eru fakliga sterkir**, og hvar til ber at bøta um.



PISA á teldu

## HVÍ PISA?

### FØRLEIKAR

Næmingar skulu loysa uppgávur, har ætlanin er at næmingar brúka fakliga vitan og samskipa hesa við gerandisligar uppgávur.

Arbeiðshátturin kann til dømis vera at nýta vitan um valutakurs í kritiskari viðgerð av onkrum teksti.

PISA inniheldur bæði spurningar við valmøguleikum og opnar spurningar, har næmingar sjálvir skulu orða síni svar.

## Trivnaður og bakgrund

- PISA-kanningin er í pørtum. Ein partur er um bakstøði næmingsins.
- Í hesum parti svara næmingar spurningum um bakstøði, ið viðvíkir heimi, skúla og kt.
- Svarini eru ætlað at lýsa sambandið millum fakligar førleikar, heimligar umstøður og fatan av skúlaviðurskiftum.

PISA 2018

## MINST TIL!

KANNINGIN VARIR UM 4 TÍMAR VIÐ STUTTUM STEÐGUM, SO TAK FRUKT/MAT OG OKKURT AT DREKKA VIÐ.

## PISA-KANNING

PISA-kanningin er antin í skúlanum ella í kanningarstaði, sum skúlin og PISA-fyrisitingin eru samd um.

Í kanningini skulu næmingar loysa uppgávur, ið líkjast **uppgávum úr gerandisdegnum.** Uppgávan kann vera ymiskt gerandisligt so sum at lesa leiðbeining ella finna skjótastu leið á korti.

Spurningar eru eisini um gerandisdag, familju og skúlagongd.

Kanningin verður gjørd við teldu.

Tú skalt **ikki fyrireika teg** til kanningina. Bert møta upp og gera títt besta.

**LES MEIRA Á** http://www.mmr.fo/fo/arbeidsoki/utbugving-og-gransking/folkaskulin/pisa/pisa-tilfar/